# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Axel T. Haraldsen til áminningar



Tann 5. desember bórust boðini, at Axel T. Haraldsen, lærari brádliga var deyður í heiminum í Havn, 59 ára gamal.

Axel var sørvingur. Tók lærarapróvg á Føroya Læraraskúla í 1969. Varð sama árið settur í lærarastarv á Føroya Specialskúla/ Skúlanum á Trøðni. Tók prógv sum tali- hoyrilærari á DLH í Århus í 1973. Var aftur á árskeiði á DLH í Århus 1989/90. Luttók eisini í fleiri skeiðum, ið Fróðskaparsetrið skipaði fyri í føroyskum og bókmentum.

Í 1984 varð Axel settur settur í starv sum tali-hoyrilærari í Suðurstreymoy. Hetta starvið røkti Axel til hann fyri nøkrum árum síðani vegna sjúku varð loystur úr starvinum.

Sum lærari var Axel nærlagdur og hugaður. Hann brann fyri at menna og stuðla uppundir teir veikastu næmingarnar í skúlanum. Eisini var hann virkin innan áhugabólkar, ið virkaðu fyri at betra um korini hjá teimum veiku í samfelagnum. Í hesum arbeiði kom holli kunnleikin hansara til specialpedagogikk øllum til góðar, ið samstarvaðu við hann.

Axel var stillførur í dagliga yrki sínum. Men kortini hevði hann sínar meiningar um slíkt, ið var frammi í tíðini.

Axel var giftur við Gunnvá, f. Thomassen úr Miðvági. Í Bóndabrekku í Havn bygdu tey og teirra trý børn Jónhard, Sonja og Jákup eitt trygt heim.

Í takksemi og djúpari virðing lýsa vit starvsfelagar frið yvir minnið um Axel Haraldsen, og tað hann avrikaði í føroyska skúlanum.

**Starvsfelagarnir á Sernámsdeplinum.**

## Minningarorð um Thomas Paula Jacobsen, skipara



Saknið tungan harmin vekur, syngur skaldið. Henda regla rann mær til hugs allahalganardag á Sjómansheiminum, tá skipað varð fyri minningarhaldi teirra sjólætnu. Í ár var minnisløtan eisini ognað øllum teimum mongu sum undir seinna heimsbardaga ikki vunnu upp aftur land.

Henda illfýsna heystardag vóru á sekstiára minningarhaldinum nakrir teirra til steðar, sum høvdu siglt undir krígnum.

At sita í fjøld, har saknur og sorgblýdni merkti løtuna, gav djúpa kenslu av lívsins álvarsemi, og ikki minst av mangan baldruta gerandisdegi hjá sjómonnunum okkara, har "bert er ein fjøl millum teirra og grøv", ið er úr sanginum "Gud signi várt fólk", og sum vit sungu henda seinnapart.

Hugsaði hesa løtu, at var verfaðir so frægur, so hevði hann óivað luttikið í minningarhaldinum. Men soleiðis skuldi ikki vera. Sama kvøldið legði hann árarnar inn fyri seinastu ferð, og var hansara fjørður rógvin, 81 ára gamal.

Thomas Pauli Jacobsen var ættaður úr Nólsoy og var hann fjórðelst av 11 systkjum, og eru tey nú bert tvey eftir á lívi.

Í 1939, júst fyltur 15 ár fór Tummas til skips, og har byrjaði hansara lívsleið sum sjómaður.

Eftir krígslok tók Tummas setskiparaprógv og í 1949 longdina. Sama ár gjørdist hann medeigari av Grønlandsfarinum, sum hann seinni førdi.

Í 1956 bleiv hann stýrimaður við Hólmi, sum hann átti í. Seinast í fimmtiárunum fór Tummas aftur uppá skúla at taka nýggja skiparaprógvið. Aftaná lokið prógv gjørdist hann skipari á Hólmi, og var hann við Hólmi til fyrst í sjeytiárunu. Haðani sigldi hann sum supercargo fyri Fiskasøluna, umframt at hann í seinnu helvt av sjeytiárunum av og á sigldi sum skipari við Star Shipping.

Tummas legðist uppi í 1979, og arbeiddi hann í nógv ár hjá Tórshavnar Havn. Seinastu árini, áðrenn pensiónsaldur, arbeiddi hann á Bacalao.

Tummas var sjómaður av náttúr, og royndist hann sum sannur álitismaður á sjónum. Útróðrarmaður var hann eisini av teimum bestu. Tá hann legðist uppi, gjørdust roktúrarnir við 10-mannafarinum Borðuni ótaldir. Tað var tí sonn fragd at vera á floti við honum. Vitugur um mið og streymviðurskifti gjørdi, at hann altíð rakti við fisk. So sjálvt tá mangir komu sørir aftur at landi, so átti Tummas altíð munin. Tá onkur hevði hetta á munni, bar hann seg undan, men brosið í eygnakrókum hansara avdúkaði, at hann mundi vera tilvitaður um sín dugnaskap.

Men tað var ikki bert á sjónum, at Tummas skaraði framúr. Ótaldu lundabyrðurnar hann veiddi og bar heim úr Urðini í Nólsoy, siga frá um mann, sum hevði sera dygg veiðievni. Somuleiðis var hann hendingamaður tá ráddi um at hagreiða veiðuna. Um tað so var at flekja, skrædla, royta e.a., so var tað gjørt við handalagi, sum var ein fragd at skoða.

Gávurík fólk duga mangan annað enn at røkja sítt lívstarv. Soleiðis var eisini við Tummasi. Fittur í hondunum og hegnigur gjørdi, at mangan vóru boð eftir honum at taka hond í har tað tørvaði. Millum túrarnar fekst hann tí ofta við húsasmíð umframt annað, har brúk var fyri hegnismanni.

Sum ein av ellivu systkjum, har peningaliga rásarúmið mundi vera avmarkað, visti Tummas hvat skuldi til fyri at lívbjarga sær. Og hansara lutur lá ikki eftir. Taldis millum teirra, sum ikki kravdi av samfelagnum, men harafturímóti var tað hansara sannføring, at virkaðu øll við sínum íbornu evnum, so var ríkiligt til øll.

Tummas hevði sum aðalmál at svara hvørjum sítt og annars at seta tering eftir nering. Hesin hugburður hevur eyðkent aldrandi ættarliðið, sum nú er um at søkka undir mold. Tey eiga heiðurin av, at vit liva í einum tryggum samfelag. Tummas var eitt livandi eyðkenni fyri hetta ættarlið - at arbeiða fyri felagsskapin, at virka uttan at vera kravmikil.

Mangan hevði hann á munni, hvussu gott føroyingurin hevur tað, og frøddist hann um framburðin, sum hann hevði upplivað í sínum æviskeiði, har hansara lutur ikki lá eftir.

Tummas giftist í 1958 við Sigbjørg Hansen, eisini úr Nólsoy. Tey bæði fingu tvær døtur, Janet, sum býr í Danmark og Eydnu, sum býr í Hoyvík. Báðar eru giftar og eiga børn.

Tummas var vertskapsmaður, og var stak fryntligur at vitja. Mong eru tey sum hava notið góðar løtur hjá honum og Sigbjørg. Hansara livandi áhugi fyri samfelagsviðurskiftum gjørdi, at tú altíð fekk eitt áhugavert kjak við hann um tað, ið var uppi í tíðini. Annars var stóri frítíðaráhugin hjá Tummasi var telving. Hann luttók í talvkappingum um vetrarnar, og altíð var hann fúsur at seta talvfólkið upp tá fólk kom a gátt.

Nú var so hansara æviskeið runnið. Afturlatin er grind, nú Tummas fór heim í ævinleikan, har vit øll hittast aftur ein dag.

Eitt hendingaríkt lív, har gott vit og skil, ágrýtni og arbeiðssemi skaptu úrslitini, er lokið.

Æra verður minnið um verfaðir og álitismannin Thomas Paula Jacobsen, skipara.

**Bjarni Djurholm**

## Dagurin í morgin

**10. desember. Judit.** Apokrýfiska bókin í Gamla testamenti greiðir frá konubrotinum Judit, sum høgdi høvdið av herhøvdinganum Holofernes. Navnið er bíbilskt og merkir *jødakvinna*.

**11. desember. Damasus**, deyður ár 384. Diakonur hjá pávanum Liberiusi og varð sjálvur valdur til páva eftir hann. Hann er fyrst og fremst kendur sum tann, ið álegði Hieronymusi at týða bíbliuna av nýggjum.

**12. desember. Eqimachus**, deyður umleið ár 250. Kristin maður í Aleksandriu, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari ráddi.

### Gullbrúdleyp

Sunnudagin 11. desember 2005 hava hjúnini Sigga og Torbjørn Andreassen á Oyrabakka gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið, eru vælkomin í heimið hjá Annie og Hera Andreassen, Hákunargøta 10 í Hoyvík frá kl. 18.00.

### Silvurbrúdleyp

Leygardagin 10. desember kunnu hjúnini Malan og Kristian Hansen í Nólsoy halda silvurbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 327112 ella 580273 áðrenn 1. desember. Byrjað verður á Flakavirkinum við døgurða kl. 19.30.

### Brúdleyp

Ì morgin, 10. desember kl. 14.00 giftast í Saron á Viðareiði, Òluva Fuglø, Norðdepil og Markus Hvannastein, Viðareiði. Opið hús verður í Norðdepli hjá foreldrunum kl. 20.00 har øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa uppá brúðarparið.

Í morgin, 10. desember kl. 14.00 giftast í Kelduni í Skálafirði, Dávid í Lág, Strendur og Theresa Sevdal, Runavík. Eftir vígsluna verður reseption í Kelduni, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í morgin, 10. desember giftast í Glyvra kirkju, Bodil Simonsen, Saltangará og Petur Súni Jacobsen, Leirvík. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Mánadagin 12. desember kl. 11.00, giftast á Ráðhúsinum í Keypmannahavn, Eyð Berg, dóttir Sigrun og Àlvur Berg, Nes Hvalba og Arnhold Olavsson, sonur Rutt og Jens Olav Trustrup jensen, Tvøroyri. Adr.: Dalslandsgade 8 M, 606, 2300 København.

### 75 ár

Sunnudagin 11. desember verður Daniel Pauli Dalbø, Syðrugøta 75 ár. Dagurin verður hildin í Gøtubrá kl. 18.00.

### Prógv

Rannvá Mortansdóttir hevur á Københavns Universitet fingið útbúgving sum cand. mag í enskum við hjálærugreinini miðlar og mentan.